## Chelsea-spælarar purraðir út

Klokkan var ikki meira enn 7 sunnumorgunin, tá ið spælararnir hjá Chelsea, sum búðu á gistingarhúsi í Manchester, vórðu purraðir út. Orsøkin var, at ein brandalarmur fór í gongd, og so máttu allir gestirnir av hotellinum. Chelsea-spælararnir máttu bíða í 50 minuttir, áðrenn teir sluppu inn á gistingarhúsið aftur – ikki júst besta fyrireikingin til toppdystin ímóti Manchester United.



## Zlatan bjargaði Inter

Tað gekk einki hjá italska toppliðnum Inter um vikuskiftið. Liðið hevði vitjan av Cagliari, og tað var um reppið, at gestirnir fóru við øllum trimum stigunum. Cagliari legði seg á odda í seinna hálvleiki, men eitt korter fyri leiklok bjargaði svenski álopsspælarin Zlatan Ibrahimovic Inter, tá ið hanns koraði til 1-1. Dysturin endaði við javnleiki, men Inter er framvegis væl á odda í italsku kappingini.

# Valdi Crewe fram um Føroyar

**Guðjón Þórðarson stóð ovarliga á ynskilistanum hjá FSF, men íslendingurin við góðu úrslitunum og harða sinnalagnum tók av, tá venjarastarv hjá Crewe Alexandra stóð honum í boði**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*



Ein av teimum, sum stóð heilt ovarlaga á listanum hjá Fótbóltssambandinum, nú nýggjur landsliðsvenjari skal finnast, var Guðjón Þórðarson.

Hesin hevur eitt stórt venjaranavn í Íslandi. Eitt nú var hann í trý ár landsliðsvenjari hjá Íslandi, og tað var undir hansara leiðslu, at Ísland var so sera nær við at vinna seg til EM-endaspælið í 2000. Avgerandi dystin ta ferðina tapti Ísland móti heimsmeistarunum úr Fraklandi við 3-2 á Stade de France í Paris. Tað var ikki fyrr enn í yvirtíðini, at heimaliðið skoraði málið, sum sendi Frakland fram um Ísland, og so siga søgubøkurnar annars, at Frakland seinni vann endaspælið.

Men eisini í aðrar mátar hevur Þórðarson gjørt um seg. Umframt at hava vant fleiri íslendsk feløg, var hann venjari, tá íslendskur kapitalur yvirtók Stoke City, sum eisini vann sær uppflyting til næst bestu ensku deildina við Þórðarson sum venjara. Í Onglandi hevur hann eisini vant Barnsley og Stoke, umframt at hann eitt skifti vanda norska Start. Og jólaaftan kundi Crewe Alexandra boða frá, at hann teir høvdu sett íslendingin í starv sum venjara.

Høgni í Stórustovu, FSF-forseti, váttar, at Guðjón Þórðarson stóð á teirra lista, men vil í aðrar mátar bert staðfesta, at nú hesin er vorðin venjari hjá enska Crewe Alexandra, er hann ikki longur aktuellur.

Tað skilst tó, at tá íslendinginum stóð í boði at gerast venjari í Onglandi aftur, vildi hann hava greitt at vita frá FSF, um hann kundi rokna við starvi í Føroyum, ella um hann skuldi taka av enska tilboðnum. Og hóast partur av starvsnevndini fegin vildi geva honum hetta lyftið, so var tað ikki nóg mikið, og tí valdi hann at taka av tryggaru loysnini.

Um Þórðarson verður annars sagt, at hann er ein sera harður hálsur sum venjari. Og meira enn eina ferð er hann endaður í breddanum fyri viðurskifti, sum ikki ganga fyri seg innan fyri hvítu strikurnar. Einamest er hann ikki bangin fyri at siga sína hugsan, og so leggur hann annars vertin á, hvat onnur halda.

Og at fótbólturin er í blóðinum, er eingin ivi um. Guðjón Þórðarson hevur tríggjar synir, sum allir royna seg sum yrkisspælarar. Teir eru Joey, Bjarni og Þórður Guðjónsson.

# Útisetar løgdu fyri við sigri

**Hondbóltsútisetarnir hava hildið jólafrí, men tóku kappingina upp aftur sunnudagin**

HONDBÓLTUR
*Rólant Waag Dam*
*rolant@sosialurin.fo*

Menninir hjá ÍF Føroyum vunnu 24-20 á VHC/Vidar, har hálvleiksstøðan var 13-13.

Við trimum mansverjum á bakkspælararnar órógvaði VHC/Vidar føroyska álopsspælið, samstundis sum teir sjálvir vóru effektivir og løgdu seg á odda við fýra málum.

Føroysku leikararnir skuldu hava eina løtu, áðrenn teir megnaðu at svara aftur. Men hvørja ferð ÍF Føroyar nærkaðist VHC/Vidar í málum, so høvdu hesir eitt aftursvar, og tískil høvdu danir leiðsluna fleiri ferðir við fleiri málum stóran part av fyrra hálvleiki.

Men tá so føroyingarnir funnu upp á at mansverja stórskjúttan hjá VHC/Vidar, vísti tað seg, at føroyska liðið stóð danska liðnum kurl, og stutt fyri steðgin kom ÍF Føroyar upp á javnt.

Eftir steðgin koyrdu føroysku leikararnir á. Rani Slættanes og Heini Bendtsen syrgdu fyri flestu av føroysku málunum, meðan Ragnar Mouritsen vardi væl fyri í hinum endanum.

Hetta hevði við sær, at ÍF Føroyar vann dystin við fýra málum, 24-20.

Av teimum 24 málunum gjørdi Heini Bendtsen 6, Rani Slættanes 5, Leif Hákun Jacobsen 4, Ári Rouch 3, Leif Mikkelsen 2, Hjalti Jacobsen 2, Magnus Poulsen 1 og Róar Akralíð 1.

Sigurin merkir, at ÍF Føroyar yvirtaka oddasessin og hava 15 stig. Team Nørrebro, ið er argasta kappingarneytin, hevur 14 stig við einum dysti til góðar.

Føroyskuhondbóltskvinnurnar hava framvegis í jólafrí.

# Dygdirnar í hásæti

**Komandi landsliðsvenjarin fær helst ovurstóra ávirkan á føroyskan fótbólt. Tí er alneyðugt, at tað eru venjaradygdirnar, sum verða settar allarovast, tá valt verður**



ÍTRÓTTARKLUMMAN
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Tað er alla æru vert, at Fótbóltssambandið hevur sett sær sum mál, at ein komandi føroyskur landsliðsvenjari ikki bert skal hugsa um A-landsliðið. Samlaða føroyska landsliðskonseptið verður eisini undir hansara veingjabreiði, eins og talan helst skal verða um ein venjara, sum gjøgnum virki sítt er førur fyri at virka sum íblástur hjá føroysku Formula-venjarunum.

Hóast tað altíð verður so, at úrtøkan hjá A-landsliðnum verður tann vágskáin, sum landsliðsvenjarin verður vigaður á, so er tað fyri føroyskan fótbólt, at júst seinasti parturin av omanfyristandandi postulati verður røktur væl og virðiliga.

Sjúklingatekinini í føroyskum fótbólti hava verið mong seinnu árini. Venjararnir eiga avgjørt ikki størsta partin av skuldini fyri hesum, men nú leitast skal aftur á beint, eru tað venjararnir, sum koma at standa við sínum heilt stóra parti av ábyrgdini.

Spælaramenning av egnum tilfeingi er nevnliga lykilin hjá einum og hvørjum felagi, sum komandi tíðina ætlar at vinna sær fram á leið, og í hesum kann ein komandi landsliðsvenjari fáa ovurstóran týdning.

Júst tí er tað beint nú av serstakliga stórum týdningi, at ein komandi landsliðsvenjari eisini hevur sínar dygdir í lagi á tí økinum.

Tað kann væl vera, at fleiri vilja hava ein hálvgum svakligan mann við stýrisvølin. Ein venjara, sum fær spælarar sínar at trúgva, at teir eisini hava møguleika at basa sjálvt størstu fótbóltstjóðunum. Ta trúnna skulu spælararnir sjálvandi eisini hava, men við teknaðu vangamyndini av landsliðsvenjaranum hevur FSF sent týðiligt signal um, at landsliðsarbeiðið eisini skal medda longur enn bara til dagin í morgin.

Og júst tí verða venjaradygdirnar av minst líka stórum týdningi sum psykologisku coaching-dygdirnar. Sjálvandi vilja vit hava ein venjara, sum kann røkka tí øgjørliga her og nú. Men her og nú hevur føroyskur fótbóltur eisini tørv á nógv meira enn bara løtuvinningi.